Gott nýggjár góðu áhoyrarar. Vónandi eru tit komin væl inn í nýggja árið.

Hjá mongum er nýggjárið eitt høvi at lýta aftur um bak og seta sær mál fyri framtíðina. Vit kenna øll til nýggjárslyftir, har vit á ymsan hátt geva okkum sjálvum lyftir um bata í nýggja árinum. Ein gamal travari er lyftið um at leggja av at roykja, men eisini lyftir um at liva heilsubetri við meira rørslu, við minni áti og onnur meira andalig lyftir um at vera meira jalig.

Ársskiftið leggur á hendan hátt upp til eina nýggja byrjan. Eina nýggja byrjan, har vit blaða upp eitt nýtt blað í bókini við avbjóðingum, menningarmøguleikum og samstarvi.

Hóast vit blaða upp nýggja síðu, so er blaðið ikki óskrivað - og langt frá. Við okkum hava vit førningin frá farna ári og øllum hinum árunum sum fóru. Soleiðis kunnu vit byggja víðari á tað forarbeiðið, ið er framt frammanundan. “Heysta fruktirnar” av tí, sum varð sátt.

Og tað er júst tað, ið vit gera í dag, nú vit hátíðarhalda, at Psykiatriski depilin verður partur av Talgildu heilsuskipanini og harvið, at alt tað føroyska Sjúkrahúsverkið við sínum 1000 starvsfólkum er integrerað í eina og somu kt-skipan.

Í dag laða vit seinasta steinin í varðanum, sum er laðaður upp gjøgnum fleiri ár. Viðhvørt hevur verið neyðugt at bøta um; laða onkran steinin av nýggjum. Men eftir at fundamentið varð lagt á tryggan hátt, kom veruliga ferð á, og upp á gott tvey ár eru øll trý sjúkrahúsini og kommunulæknarnir komnir í skipanina.

Av tí at Føroyar er fyrsta landið í heiminum at realisera visjónina um eina pappírsleysa sjúklingajounal til allar borgarar, er úrslitið ein lýsandi varði, ið eisini hevur vakt ans uttanlands.

------

**Hvat er so Talgilda heilsuskipanini?**

Talgilda heilsuskipanin savnar allar upplýsingar um sjúklingar í eina og somu skipan. Ein skipan, har allar heilsuupplýsingar hjá tí einstaka føroyinginum eru tøkar uttan mun til, um ein fer til kommunulækna ella serlækna – um ein fer til kanningar í einum ambulatiorii ella verður innlagdur á sjúkrahús.

Flest okkara hava ta mynd, at sjúklingajournalin er ein pappírsmappa. Ein pappírsmappa, sum læknin hevur tøka undir eini kanning ella á stovugongd. Læknin dikterar sínar eygleiðingar og avgerðir, og skrivarin tøppar hettar inn á skrivimaskinu.

Tað sum fá av okkum vita, er hvussu nógvar ymiskar upplýsingar liggja í eini sjúklingajournal – og sum nú, umframt í læknajournalini, verða tøkar í THS.

Talan er m.a. um úrslit av blóðroyndum og kanningum, røntgenmyndum og yvirlit yvir tann heilivág, sjúklingurin fær.

Í THS verða allar avtalur skrásettar: Nær skal sjúklingurin aftur til kanning, nær skal hann innleggjast, nær er hann settur til skurðviðgerð o.s.fr.

Sum nakað heilt nýtt eru eisini tær journalir og skrásetingar, sum sjúkrasystrar, fysio- og ergoterapeutar, kostráðgevar, ljósmøðrar o.o. - hvør í sínum lagi føra, tøkar í THS skipanini.

Tað er ikki lætt hjá vanligum fólki - heldur ikki hjá okkum politikarum - at skilja, hvørjar kollveltandi møguleikar THS hevur við sær - uttan mun til, um vit tosa um sjúklingatrygd ella sjúklingatænastur, dygdarmenning ella planlegging og raðfesting.

Fyrst og fremst verður broytingin, at journalin fer at verða tøk uttan mun til tíð og stað hjá teimum, sum hava rætt til at lesa og skriva í henni. Hetta økir um trygdina hjá sjúklinginum og lættir um hjá starvsfólki, sum annars hava nýtt nógva tíð at leita fram journalir.

Sjúklingurin fer at uppliva, at hevur hann einaferð latið sínar upplýsingar til eitt heilsustarvsfólk, so fara hesir upplýsingar í stóran mun at verða til taks hjá tí næsta.

Kommunulæknin kann á síni egnu teldu fylgja sjúklingagongdini: Nær sjúklingurin sleppur til kanning, skurðviðgerð, ella nær hann skal innleggjast.

Við tvørfakligu journalini, fáa starvsfólk betur nýtt vitanina hjá hvørjum øðrum. Tann dupultskráseting, sum vit vita fer fram í dag, og sum eisini økir um møguleikan fyri feilskrásetingum, gerst heilt óneyðug.

THS veitir óteljandi møguleikar, fyri at dygdarmenna kliniska virksemið, og veitir okkum unikkar møguleikar fyri gransking.

Og at enda, so fáa avvarðandi leiðslur og politiski myndugleikin eitt virkið amboð til planlegging, raðfesting og stýring, t.d. út frá dagførdum bíðilistum, sum nú eru tøkir á sjúkrahúsunum.

-----

Tvey granskingarlið hava fylgt verkætlanini í fleiri ár. Og ein av granskaraleiðarunum, Poul Erik Rostgaard frá Århus Universiteti – ið er serliga viðurkendur innan effektgransking – legði í vár fram úrslitini av teirra kanningum í Heilsumálaráðnum.

Sambært Poul Erik Rostgaard, eru Føroyar í heimsklassa, tá ræður um strategi, val av skipan og væleydnaða verkseting. Sambært kanningunum bendir nógv á, at vit í Føroyum koma at fáa gagnligar effektir, sum hann ikki hevur sæð ella lisið um aðrastaðni.

Í so máta er føroyska talgilda heilsuskipanin millum tær allar fremstu í heiminum, og tað eiga vit øll at vera errin av. Vit eiga at vera errin av, at føroyska heilsuverkið hevði mót upp á at fara undir hesa – tað størstu KT-verkætlanina nakrantíð í Føroyum. Og at vit við hørðum og miðvísum arbeiði náddu málinum.

Eg vil nýta høvi at takka leiðslum og starvsfólkum í Heilsumálaráðnum, á sjúkrahúsunum, kommunulæknunum og starvsfólki teirra, sum øll – so ella so – hava haft leiklutir innan hesa verkætlan.

Eina serliga tøkk verður eisini send teimum fýra verksetarunum, Mariu, Gunnvá, Sigbritt og Hervør, sum saman við Jóanis Erik og Dánjal Paula hava tikið størstu tøkini, fyri at vit í dag eru, har vit eru.

-----

Nú vit laða seinasta løgusteinin fyri THS á sjúkrahúsunum, eru vit komin á eitt vegamót – ella eina kjørbreyt, kunnu vit eisini siga. Ferðin endar ikki her, langt burtur frá. Men hóast kósin verður varðveitt, broytir ferðin karakter og skap.

Tí alt bendir á, at ikki fyrr enn tit hava nýtt skipanina í eina tíð, fáa tit veruliga mett um dygdina av skipanina, og er tað kanska tá, at tit gerast greið yvir, hvussu hon í veruleikanum best kundi verið uppsett ella tillagað til tykkara tørv.

Hettar merktu vit beinanvegin eftir fyrstu verksetingarnar, og vit kundu allarhelst sent øll okkara THS fólk oman á ein depil at víðariment skipanina í bæði mánaðir og ár.

Í 2010 valdu vit tó at raðfesta verksetingina framum tillaging og víðarimenning.

Vit hava ásannað hesi árini, at tað er sera óheppið, tá nøkur arbeiða, grundað á pappír – meðan onnur eru talgild.

Hin vegin, so er tað eisini týdningarmikið, at tað eisini framyvir er orka til at tillaga og víðarimenna skipanina, so at tit koma at uppliva THS sum eitt arbeiðsamboð, sum ikki forðar, men fremur og stuðlar tí kliniska arbeiðinum, sjúklinginum at gagni.

Og tí fara vit áhaldandi at menna og útbyggja skipanina, samstundis sum vit tryggja, at skipanin bæði virkar væl og er støðug.

THS er vorðið nervalagið í stórum parti av heilsuverkinum, og tað setur krøv til okkum at reka hesa skipan, so tit sum starvsfólk uppliva, at tit fáa ta hjálp, tykkum tørvar. At skipanin er trygg og tøk 24 tímar hvønn einasta dag og serliga, at tit sum starvsfólk kunnu líta á tær upplýsingar, sum eru í skipanini.

-----

Eins og árskiftið leggur upp til ein nýggja byrjan, leggur hesin dagur eisini upp til eina nýggja byrjan. Eina nýggja byrjan við nýggjum avbjóðingum, nýggjum menningarmøguleikum og øktum samstarvi innan heilsuverkið, heilsustarvsfólkum og ikki minst sjúklingunum at gagni.

Tillukku øll somul!